## Bar við botn

Ferjan »Trollfjord«, sum er eitt av skipunum hjá norska reiðarínum Hurtigruten, liggur nú við bryggju, eftir at tað tók botn. Í gjár vóru kavarar niðri og kannaðu botnin, og sambært blaðnum Nordlys hevði skipið fingið fleiri smá hol á botnin, men vandi var ikki fyri skipinum. 374 ferðafólk vóru við skipinum, tá óhappið hendi,og tey fara ætlandi við øðrum skipum ella flogførum. Manningin, sum telur 65, verður verandi umborð.

## Lívfrøðin skipað seg

Nevndin í tí nýstovnaða Lívfrøðingafelagnum skipaði seg á nevndarfundi í gjár. Jóhannis Danielsen bleiv valdur til formann, Jóhanna Olsen er næstformaður, Bjørg Mikkelsen skrivari, Eydna í Homrum kassameistari, og Janus Hansen er nevndarlimur. Ti8ltalslimir eru Maria Gunnleivsdóttir Hansen og Dorete Bloch. Lívfrøðingafelagið ætlar sær at menna almennu tilvitanina um lívfrøði og fer at skipa fyri fyrilestrum fyri limum og øðrum.

# Væntar at sleppa undan arbeiðssteðgi

**Semingsmaðurin hevur merkt á sær at bæði arbeiðsgevarar og arbeiðarafeløg hava ein ektaðan vilja til at finna semju. Undir øllum umstøðum væntar hann ikki, at arbeiðssteðgur verður fyrrenn um nakrar dagar**

SEMINGSROYNDIR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Eg vænti, at vit sleppa undan einum arbeiðssteðgi. Tað var ein rættiliga bjartskygdur semingsmaður, sum sat og legði seinastu fyrireikingarnar á alt avgerðandi semingsfundin ímillum arbeiðsgevararnar og tey fimm arbeiðarafeløgini.



*Tað er við góðum treysti, at semingsmenninir báðir, Terje Sigurðsson, vm. og Símum Absalonsen, fóru undir semingsroyndirnar seinnapartin í dag*

Terje Sigurðsson, semingsmaður, sigur, at hann væntar, at semingsroyndin fer at enda við eini semu, so at vit sleppa undan einum landsumfatandi arbeiðssteðgi.

Semingsfundurin skuldi byrja klokkan 13 í dag, men frammanundan hava teir báðir semingsmenninir, Terje Sigurðsson og Símun Absalonsen havt samband við partarnar alt vikuskiftið, har teir hava loddað dýpið.

Tað, sum er komið fram undir hesum tingingunum, gevur hon øktar vónir um, at tað fer at eydnast finna semju.

- Talan er um ábyrgdarfull fólk, sum eru við í hesum samráðingunum, so arbeiðssteðgur eri ikki ein møguleiki, sum vit hugsa um í løtuni.

Men partarnir standa rættiliga langt frá hvørjum øðrum og skal semja finnast, krevst tað sjálvandi, at báðir partar geva seg.

Hann sigur, at eftir at hava tosað við partarnar, hevur hann eina greiða fatan av, at bæði arbeiðsgevarar og arbeiðarafeløg eru sinnað at gera, hvat tey kunnu fyri at sleppa undan, at leggja landið lamið.

- Báðir partar vísa ein ektaðan vilja til at finna eina semju, so tað er sjálvandi hetta, sum verður málsetningurin.

- Men kunsturin og avbjóðingin verður so at finna eina semju, sum liggur innanfyri pínumarkið hjá báðum pørtum og vónandi fer tað at eydnast, sigur semingsmaðurin.

**Ganga nakrir dagar**

Semingsmaðurin hevur longt sáttmálan til á midnátt í kvøld og vanliga fatanin hevur verið, at sostatt verður eisini arbeiðssteðgur á midnátt, eydnast tað ikki at finna semju.

Men her er semingsmaðurin ósamdur.

Hann heldur, at endar tað við arbeiðssteðgi longu á midnátt, skal tað ganga heilt óvanliga illa.

- So leingi vit samráðast verður ongin arbeiðssteðgur. Og so leingi nakrar sum helst vónir eru fyri semju, ætla vit at halda á við samráðingunum og at taka okkum ta tíð, sum krevst.

Og tað er so mangan komið fyri, at samráðingar hava verið tveir, tríggjar og fýra dagar, áðrenn tað verður greitt um tað verðu egg ella ungi.

Gongst illa og semingsroyndin slitnar, er sostatt ikki væntandi, at tað verður fyrrenn um nakrar dagar.

# Ingeborg Vinther í øðini inn á Strandferðsluna

**Stjórin á Strandferðsluni gjørdi at tað var ófriðarligt heima hjá forkvinnuni í Føroya Arbeiðarafelag alt vikuskiftið**

SUÐUROYARSIGLING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Verður verkfall, sleppur Smyril at sigla kortini!!!!

Tað sker Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag enn einaferð út í papp.

Hon er í øðini inn á stjóran í Strandferðsluni, tí hann hevur alment boðað frá, at endar tað við verkfalli, verður Smyril lagdur, so at Suðuroyggin verður avskorin frá meginøkinum.

-Tað er ótrúligt, at stjórin fyri eini almennum stovni ikki kann hugsa seg betri um áðrenn hann almannakunngerð slík ósannindi, sigur Ingeborg Vinther.

Fráboðanin frá stjóranum á Strandferðslnui um, at Smyril verður lagdur í einum verkfalli, gjørdi vikuskiftið hjá Ingeborg ógvuliga ófriðarligt.

- Telefonin ringdi alla tíðina at spyrja og at skeldast, so tað var lítil friður, sigur forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag.



*- Lat tað vera sligið rimmarfast: Endar hetta við verkfalli, verður Smyril ikki lagdur, men sleppur at sigla sum vant við fólki og privatbilum, eru bæði Ingeborg Vinther og Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag púra samd um. Ingeborg Vinther harmast um, at stjórin á Strandferðsluni hevur loypt óneyðugan ótta á fólk*

Hon sigur, at tað vóru øll møgulig fólk, sum ringdu. Ikki minst vóru tað fólk, ið skuldu av landinum, sum stúrdu fyri um tey nú ikki sluppu avstað ella ikki.

**Harmiligt og átaluvert**

Men Ingeborg Vinther staðfestir eisini, at øllum hesum trupulleikanum kundu vit sloppið undan.

- Hevði stjórin á Strandferðsluni hugsað seg um og var hann ikki lopin fram, høvdu vit sloppið undan at loypt óneyðugan ótta á fólk.

Hon vísir á, at seinast, tá ið verkfall var, fekk Smyril undantaksloyvi at sigla.

- Arbeiðarafeløgini hava eisini longu tikið avgerð um, at endar hetta við verkfalli, fær Smyril aftur hesuferð undantaksloyvi at sigla við fólki og privatbilum.

Einasta treyt er, at hann ikki flytir farm.

- Hetta kunngjørdi eg eisini í samrøðu við Sosialin longu mikudagin annan mai.

- Tí er tað ómetaliga harmuligt og átaluvert, at stjórin fyri Strandferðsluna upp undir vikuskiftið kunngerð, at Smyril skal leggjast og sostatt loypur óneyðugan ótta á fólk.

Hon sigur, at verður verkfall, fáa teir limir í arbeiðarafeløgunum, sum eru knýtt at Smyrli, undantaksloyvi at vera til arbeiðis.

Tað er galdandi bæði fyri teir, sum binda og loysa og teir, sum ganga náttarvakt umborð.

- Undir øllum umstøðum, kundi stjórin fyri Strandferðsluni sett seg í samband við fakfeløgini, áðrenn hann leypir á leistum og almannakunngerð ósannindi, sigur ein rættiliga ørg fakfelagskvinna við Sosialin í morgin.

Vit fingu ikki orðið á strandferðslustjóran fyri evstamark í dag.